Útgjalding av vinningsbýti

Á aðalfundi 29. mei 2006 varð samtykt at gjalda vinningsbýti til partaeigararnar. Vinningsbýtið er 100% av partapeninginum, t.e. kr. 5.050.000.

Fyri at tað skal verða møguligt at gjalda út, er neyðugt, at hvør einstakur partaeigari letur okkum hesar upplýsingar:

- **Navn á eigara**
- **P-tal og kontonummar í peningastovni**
- **Litra og nr. á partabrævi**

Vit hava goldið vinningsbýtið til teirra, sum áður hava latið okkum omanfyri nevndu upplýsingar.

Einans tey, sum eru skrásett sum eigarar, kunnu fáa útgoldið vinningsbýti og luttaka á aðalfundi.

P/f Tjaldur

Postrúm 250 · 700 Klaksvík
Tlf. 45 75 00 · Fax 45 73 80
Teldupostadressa: status@post.olivant.fo

VÁSTI 459010

STJÓRI TIL ARBEIÐSLOYSISSKIPANINA

Fyri Arbeiðsloysisskipanina verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber

Um Arbeiðsloysisskipanina
Høvuðsendamálini við Arbeiðsloysisskipanini eru sambært § 1 í løgtingslóg um arbeiðsloysis-trygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997:

- at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys
- at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði
- at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin

Arbeiðsloysisskipanin verður stjórnað av einum stýri, sum er samansett av 7 umboðum, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakara-feløgunum á arbeiðsmarknaðinum – verður valt av Føroya Landsstýri. 3 limir skulu umboða arbeiðstakarafeløgini, 2 limir skulu umboða arbeiðsgevarafeløgini, 1 limur skal umboða tað almenna og 1 lim velur landsstýrið beinleiðis, og hann skal verða formaður.

Starvið
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Arbeiðsloysisskipanini við tilvísing til stýrið.

Stjórin skal í neyvum samstarvi við stýrið hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av rakstrinum hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika.
- hevur hollan kunnleika til arbeiðsmarknaðar, vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- hevur hegni og hug til at leiða Arbeiðsloysisskipanina

Umsóknir
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Rasmussen & Weihe statsautoriserað grannskoðarafelag P/F í seinasta lagi 11. september 2006.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ole Guldborg Nielsen á telefon 35 17 00.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Sosialurin 341800

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F

International worldwide cooperation

Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo

SISERO 351800

Mánadagin 28. august frá kl 10.00 verður

ÚTSØLA

fyri at gera pláss fyri nýggjari vøru

Frávaldar vørur
úr –20 til –50%
í avsláttri

m.a.:
Ymiskar vørur frá Green Gate – House Doctor og øðrum ...

Eisini lata vit 10% í avsláttri fyrsta og næsta útsølu dagin (28. & 29. aug.) av øllum ikki útsølu vørum, undantikið møblum

Støkk inn á gólvið og ger kvettið

Frú Carl

Dr. Jacobsensgøta 3
Tel 312155
... hugni til heimið

Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel 31 89 03, Fax 31 87 03

bókhaldsvirkið RannTeld

Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð

Restaurant Merlot
til sølu

Vit hava nevndu matstovu til sølu.
Matstovan er av "fínara" slagnum og er kend fyri sera góðan mat.
Hon heldur til í leigaðum hølum í miðbýnum (Magnus Heinasonargøtu 20) í Havn.
Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður.
Minsti prísur er settur til kr. 600.000,00, og verður hon seld fyri hægsta boð omanfyri tað.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 318930/505300, telefaks 318703 ella t-post rannteld@rannteld.info

bókhaldsvirkið RannTeld

RannTeld er eitt bókhaldsvirki, sum røkir skrivstovu-, bókhalds- og aðrar uppgávur fyri einstaklingavirkir, smápartafeløg og partafeløg. Eftirspurningurin eftir teimum tænastum RannTeld veitir er støðugt vaksandi, samstundis sum tænastuumráðið eisini økist í hvørjum. RannTeld byrja i sítt virksemi í 1991 við einum starvsfólki. Í dag hevur RannTeld fýra fólk í starvi.